## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri, um kvøldið upp í ein strúk. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri, seinnapartin nakað minni vindur. Stundum regn ella mjørki og hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og stundum sirm ella mjørki. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og eystri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 13 stig.

# Balsameraðu Kristian IX í plastikk




*Í morgun – 14. september hevði onkur smoygt eina risastóra hít yvir Kongaminnið í Havn*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Onkur, ið stendur Unga Tjóðveldinum nær, hevur í nátt smoygt eina risastóra hít yvir Kongaminnið á Gripsheyggi í Havn – júst í dag 14. september**

POLITISK HAPPENING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tey, sum í morgun hómaðu Gripsheygg í Havn í mjøkaðunum, varnaðust kanska, at Kongaminnið varð sveipað í plastikk.

Tá fleiri fólk, ið standa Tjóðveldisflokkinum nær, gjørdu okkum varug við hesa sjáldsomu sjón: At ein risastór hít skuldi vera smoygd yvir Kongaminni júst í dag, 14. september, kundu vit kanska hildið, at Tjóðveldisflokkurin – ella kanska Unga Tjóðveldið, hevði okkurt við hetta at gera – kanska til tess at markera eina ávísa vanvirðing fyri Kongaminninum og tí, sum hevur við kongshúsið og ríkissamand okkara við Danmark at gera.

Men soleiðis er tað eftir øllum at døma ikki.

Vit spurdu Barbaru Holm, sum er forkvinna í Unga Tjóðveldinum, um hon verið og smoygt eina hít yvir Kongaminnið í nátt.

– Nei, tað havi eg ikki, segði hon avgjørd.

Men hon visti hvør tað var, hóast hon ikki vildi siga okkum tað. Hon visti heldur ikki, hví hetta mundi vera gjørt, ella um tað mundi hava nakað við dagin í dag – 14. september, at gera.

Men borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen ivast ikki í, at tað hevur okkurt við 14. september at gera.

– Hatta taki eg púra avslappað. Hatta er so teirra máti at markera dagin uppá, og eg havi einki ímóti, at tey gera tað, hóast hatta tykir mær heldur platt, sigur Heðin Mortensen.

Fyrr hava fólk gjørt seg inn á Kongaminnið við at mála slagorð hjá Tjóðveldisflokkinum á sjálvt Kongaminni. Slíkt er herverk, og tað dámar borgarstjóranum sjálvandi ikki. Men um tjóðveldisfólk halda tað vera stuttligt at smoyggja eina stóra hít yvir Kongaminni, so tey um tað, heldur hann.

Kongaminnið varð reist í á Gripsheyggi í Havn í 1882 til minnis um fyrstu kongavitjan í Føroyum nakrantíð, tá Kristian IX kongur og Valdemar prinsur vitjaðu her. Teir vóru á veg til 1.000 ára haldið fyri landnámi í Íslandi, tá teir vitjaðu her nakrar dagar stutt fyri ólavsøku í 1874.

Tað var ta ferðini, at Andreas Christan Lützen, borgarstjóri og lærari í Havn small deyður í føvningin á kongi, tá hann helt vælkomurøðu fyri honum á Kongabrúnni í Havn, sum tá eisini fekk navnið Kongabrúgvin.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | -- |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 19 |
| London | 24 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 11 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 28 |
| Madrid | 32 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 29 |
| Malta | 30 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 25 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 15 |
| New York | 31 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 19 |
| Meksikobýur | 31 |
| Panama | 15 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 979 hPa. sunnan fyri Ísland fer spakuliga norðureftir og grynnist. Brúgvalagið haðani til Føroya fer spakuliga eystureftir.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Írland – ex ódnin "FLORENCE" – fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður væntandi við Føroyar leygardagin.




## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 6/9 kl. 06[00]– 7/9. 06[00]. Hitin í gjár: 9,9°
Minsti hiti máldur í september: 0,2° - Mesti hiti máldur í september: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 6/9 kl. 06[00]– 7/9 kl. 06[00]
Avfallið higartil í september: 0,0 mm

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

8. september Mánin næstur jørðini
14. september Seinna kvarter
22. september Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 14. Sept | 00.29 | 13.11 | - | 12.11 | - | 12.26 | 02.29 | 15.11 | 03.29 | 16.11 | 11.26 | - | 10.26 | 23.29 | 00.44 | 13.26 | 01.44 | 14.26 | 00.14 | 12.56 | 01.29 | 14.11 |
| 15. Sept | 02.14 | 14.35 | 01.14 | 13.35 | 01.29 | 13.50 | 04.14 | 16.35 | 05.14 | 17.35 | 00.29 | 12.50 | 11.50 | - | 02.29 | 14.50 | 03.29 | 15.50 | 01.59 | 14.20 | 03.14 | 15.35 |
| 16. Sept | 03.01 | 15.28 | 02.01 | 14.28 | 02.16 | 14.43 | 05.01 | 17.28 | 06.01 | 18.28 | 01.16 | 13.43 | 00.16 | 12.43 | 03.16 | 15.43 | 04.16 | 16.43 | 02.46 | 15.13 | 04.01 | 16.28 |
| 17. Sept | 03.53 | 16.18 | 02.53 | 15.18 | 03.08 | 15.33 | 05.53 | 18.18 | 06.53 | 19.18 | 02.08 | 14.33 | 01.08 | 13.33 | 04.08 | 16.33 | 05.08 | 17.33 | 03.38 | 16.03 | 04.53 | 17.18 |
| 18. Sept | 04.41 | 17.04 | 03.41 | 16.04 | 03.56 | 16.19 | 06.41 | 19.04 | 07.41 | 20.04 | 02.56 | 15.19 | 01.56 | 14.19 | 04.56 | 17.19 | 05.56 | 18.19 | 04.26 | 16.49 | 05.41 | 18.04 |

5 707265 100050 >